Oyggjaleikir 2005
SHETLAND



**Sosialurin í Hetlandi**
*Eyðun Klakstein, blaðmaður eydun@sosialurin.fo*
*Jákup Mørk, blaðmaður jakup@sosialurin.fo*
*Jens Kristian Vang, myndamaður jensk@sosialurin.fo*

## Tung marathon renning



*Guttorm Sørensen var fyrsti føroyingurin um málstrikuna*

Teir tríggir føroysku 1/2 marathon-rennararnir, Guttorm Sørensen, Sam Vang og Cecil Weihe endaðu miðskeiðis í røðini, tá kappingin var á skránni fríggjamorgunin.

Tað var hampuliga skjótt, at feltið skrædi seg sundur, og ein rennari av Gibraltar vann seg rættiliga sannførandi inn á gullplássið.

Guttorm var fyrstur av føroysku rennarunum, og kom hann á mál sum nummar 11 í tíðini 1.19,01. Sam Vang og Cecil Weihe gjørdust ávíkavist nummar 11 og 12. Samanlagt gjørdist føroyska liðið nummar fimm.

Hjá kvinnunum tók Rigmor N. Arge lut fyri Føroyar, men hon mátti gevast, tá teinurin var á leið hálvrunnin. Við einum penicilin-kuri í blóðinum, var orkan at renna snøgt sagt ikki til staðar.

**-jm**

## Saaremaa vann

Talan varð um sannan gysara, tá mansfinalan í flogbólti var á skránni hósdagin.

Bermuda legði best út og vann tey bæði fyrstu settini, men Saaremaa noktaði at geva seg. Teir tóku tey trý næstu settini, hóast tað stóð nógv á í nøkrum teirra, og soleiðis kundu teir aðru ferð á rað fáa gullmerki. Settúrslitini vóru 24-26, 20-25, 25-19, 25-23, 15-13.

**-jm**



*Mary-Ann Isaksen, Malena Josephsen og Ann Olsen renna triumferandi móti áskoðarunum. 12-0 í seinasta dystinum, og gullið í kvinnufótbólti er framvegis føroyskt*

# Reint hat-trick

**Triðju oyggjaleikirnar á rað tóku fótbóltskvinnurnar gullið. Men hóast sigurin enn einaferð var tryggur, so vóru leikirnir hesa ferð meira áhugaverdir ítróttarliga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Tað var punktum við manér, tá føroysku fótbóltskvinnurnar fríggadagin spældu sín seinasta dyst á oyggjaleikunum.

Gullið var langt síðani komið til høldar, men fyri tað hildu kvinnurnar seg ikki hava nakra orsøk at taka sær av løttum. Tær søktu støðugt á málið, og tað tók heldur ikki langa tíð, áðrenn hol var komið á, og so var bara at telja. Og sum onkur áskoðari tók til móti dystarenda, so mátti hesin úr hosunum, um fylgjast skuldi við í málskjótingini.

Skal takast saman um kappingina hesaferð, so skerst ikki burtur, at tað úr einum føroyskum sjónarhorni var áhugavart, at Bermuda nú hevði teknað seg til, eins og Áland aftur var við.

Tí hóast talan aftur varð um fult stigatal til okkara, so gav hetta nakað meira av kapping, og kunnu eitt nú Gotland eisini koma við einum liði næstu ferð, so verður kappingin straks enn meira áhugaverd fyri okkara.

Tí tað man neyvan vera nakar ivi um, at okkara aftur ætla sær gullið um tvey ár. Og hóast útskiftingin í kvinnufótbolti oftani er stór, so prógvaðu fleiri av yngru spælarunum, at tær væl og virðiliga eru førar fyri at lyfta arvin, tá tann tíðin kemur. Jacoba Langgaard prógvaði ferð eftir ferð, at hon hevur eitt framúr eyga fyri spælinum. Ása Dam á Neystabø setti seg mest sum á alla høgru síðu í hvørjum dysti, og á sama hátt tóku fleiri av hinum yngru spælarunum møguleikan, tá hann kom.

Alt í alt ein oyggjaleikakapping, sum helst mundi geva kvinnunum meira venjing enn tær báðar undanfarnu. Men tað var kanska eitt sindur spell, at dystirnir móti Álandi og Bermuda vóru somikið tíðliga í kappingini. Men tað er kanska eisini nakað, sum kann betrast til næstu ferð.

Men tað kann úrslitið neyvan. Enn einaferð sýndu føroysku kvinnurnar, at tær eru tær sterkastu, tá tað ræður um spælið við leðurkúluni. Og tað er ein trúna, sum tær altso kunnu sita trygt á í øllum førum tvey ár afturat

## FAKTA UM DYSTIN

**Føroyar-Guernsey 12-0 (6-0)**
1-0: Vivan Bjartalíð
2-0: Halltóra Joensen
3-0: Vivian Bjartalíð
4-0: Rannvá Andreasen
5-0: Rannvá Andreasen
6-0: Rannvá Andreasen
7-0: Rannvá Andreasen
8-0: Halltóra Joensen
9-0: Rannvá Andreasen
10-0: Sólvá Joensen
11-0: Sólvá Joensen
**Føroyar:** Randi Wardum - Asta Magnussen, Bára S. Klakstein, Unn Kragesteen, Súsanna Hansen -Ása Dam á Neystabø (Sólvá Joensen, 72., Rannvá Augustinussen, Jacoba Langgaard (Rakul Magnussen, 60.), Vivian Bjartalíð - Halltóra Joensen (Malena Josephsen, 60.), Rannvá Andreasen